Tórshavn 30.10.2020

Frá:

Amnesty International Føroyar
J. H. Schrøtersgøta 7
100 Tórshavn
Føroyar
Teldupostur: amnesty@amnesty.fo
Telefon: 315816

Til:

Trivnaðarnevndin
Uni Rasmussen, formaður
Sirið Stenberg, næstformaður
Rósa Samuelsen
Erhard Joensen
Aksel V. Johannesen
Hervør Pálsdóttir
Jóhan Eli Poulsen

Áheitan um at støði verður tikið í ST sáttmálum, sum Føroyar hava staðfest og bundið okkum til, tá lógir verða smíðaðar.

Amnesty International ynskir við hesum skrivi at minna á, at Føroyar hava bundið seg til ST sáttmálan um rættindini hjá fólki, ið bera brek. Hetta er viðkomandi í samband við eina røð av lógum og lógarbroytingum. Í hesum umfari ynskja vit at gera vart við hetta, nú ætlanir eru um at gera broytingar í tillagaðum størvum.
Amnesty metir, at ætlaðu broytingar í uppskotinum: LM-031/2020: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøk (Broytt tillagað starv, nýggj javning o.a.) er eitt dømi um lógarbroyting, sum er í stríð við ST sáttmálan um rættindi teirra, ið bera brek. Tí vil Amnesty heita á Trivnaðarnevndina um at uppskotið verður broytt munandi ella tikið aftur.

ST sáttmálin um rættindi teirra, ið bera brek, bindir londini í grein 27 b at:

> *"verja rættin hjá fólki, sum bera brek, til – á jøvnum føti við onnur – rættvís og gagnlig arbeiðsviðurskifti, har í millum javnbjóðis møguleikar og somu løn fyri arbeiði við sama virði…"*

Síða 7 í fyrstu frágreiðingin frá Føroyum til ST í sambandi við sáttmálan staðfestir víðari at í Føroyum:

> *"... er ikki loyvt at gera mismun á ... lønar-og setanartreytir."*

Grein 27 í sáttmálanum stykki c staðfestir víðari, at londini skulu:

> *"c. tryggja, at fólk, ið bera brek, eru før fyri at gagnnýta síni arbeiðs– og fakfelags rættindi á jøvnum føti við onnur."*

Lógaruppskotið ger, at tað verður mismunur á lønar og setanartreytum í Føroyum. Eins og fíggjarlógaruppskotið fyri 2021 staðfestir, so ger lógaruppskotið, at fólk við tillagaðum størvum missa síni fakfelagsrættindi tá um ræður lønina, og ger tað at fólk verða sett undir ymsum treytum, og lønin ikki er hin sama fyri sama arbeiðið.

Grein 28 í sáttmálanum verður somuleiðis brotin. Hon staðfestir eitt nú:

> *"1. Limalondini viðurkenna, at fólk, ið bera brek, hava rætt til ... støðugt bøtt lívskor..."*

At minka lønina, frátaka fólki fakfelagsrættindi teirra og at minka løn teirra munandi, um tey skifta til samsvarandi starv tey hava, er ikki at støðugt bøta um lívskor teirra. Tað er at gera tey munandi verri og ótryggari.

Viðmerkingarnar í september 2014, frá ST nevndini, ið kannar rættindi teirra sum bera brek, staðfestu at:

> *"Nevndin mælir til, at sáttmálapartur ríkisins tekur øll neyðug stig til at økja nógv og skjótast til ber prosentið av fólki, ið bera brek, sum virka á opna arbeiðsmarknaðinum..."*

Lógaruppskotið er í andsøgn við hetta málið, og tað er harmiligt. Eitt samt Løgting bøtti um skipanina, fyri at náa hesum málinum skjótari. Breiða semjan vísti, at allir flokkar ynskja at tryggja fólkum, ið bera brek, somu treytir, sum restin av samfelagnum. Tískil vóna vit, at Løgtingið heldur fast við teirri avgerðini, og virðir ásetingarnar í ST sáttmálanum um rættindi teirra, ið bera brek.

Vit gera mismun og taka aftur vunnin rættindi

Amnesty meinar altso, at henda lógarbroyting fer at hava við sær, at borgarar missa vunnin rættindi og at mismunur verður gjørdur á borgarum.

Amnesty vil nýta høvið at heita á Føroya Løgting og Trivnaðarnevndina um at tryggja, at støði verður tikið í ST sáttmálum, sum vit hava staðfest og bundið okkum til sum land, tá lógir verða smíðaðar.

Amnesty International Føroyar

J. H. Schrøtersgøta 7
100 Tórshavn
Føroyar
Teldupostur: amnesty@amnesty.fo
Telefon: 315816

AMNESTY
INTERNATIONAL